SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Kenna tit tykkum noydd at fara á val, skulu tit gera tað, men vit vita, hvat tit hugsa í hjørtum tykkara*

*(Morgan Tsvangirai)*

# EINMANSVAL Í ZIMBABWE

*Í dag er forsetaval í Zimbabwe. Valð er umval, tá sambært almennu valnevndini fekk hvørki av valevnunum tey neyðugu 50 prosentini á sjálvum valinum, sum var tann 27. mars. Men hesaferð hava veljararnir einki at velja ímillum, tí bara eitt valevni er. Tað er Robert Mugabe, forseti. Valevnið hjá andstøðuni, Morgan Tsvangirai, tók seg aftur fyri nøkrum døgum síðani, og hann hevur síðani hildið til á niðurlendsku sendistovuni í høvuðsstaðnum Harare*




## Ramos-Horta skal verja mannarættindini

**Forsetin í Eysturtimor, Jose Ramos-Horta, hevur fingið tilboð um at gerast mannarættindakommiserur hjá ST**

Talsmenn hjá ST váttaðu í gjár, at heimsfelagsskapurin hevði boðið Jose Ramos-Horta starvið sum kommiserur í mannarættindaviðurskiftum, men at forsetin hevði biðið um at fáa eitt samdøgur til at hugsa um tilboðið. Keldur í Eysturtimor søgdu í nátt, at Ramos-Horta er sinnaður at taka av tilboðnum, og at hann í veruleikanum longu hevði tikið avgerð.

Jose Ramos-Horta stóð í mong ár á odda fyri at útvega Eysturtimor loysing frá Indonesia. Í mai í fjør varð hann valdur til forseta í eitt fimm ára skeið. Hann fekk friðarheiðursløn Nobels í 1996.

Politiskir eygleiðarar siga, at tað kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri viðurskiftini í Eysturtimor, um Jose Ramos-Horta leggur frá sær. So seint sum í februar varð roynt at beina fyri honum, og fer hann frá nú, kann tað eggja hansara mótstøðumonnum til at skipa fyri ófriði, siga eygleiðararnir við Reuters.



*Jose Ramos-Horta er forseti í Eysturtimor (Mynd: Polfoto)*

## 60 ár síðani Berlin-loftbrúnna

**Týskarar mintust í gjár, at 60 ár eru liðin, síðani vestanveldini skipaðu loftbrúnna til Vesturberlin, eftir at russar høvdu stongt farleiðirnar til býin**

Loftbrúgvin verður ofta umrødd sum tann fyrsti samanbresturin í kalda krígnum, tí tað var fyrstu ferð, at vestanveldini og fyrrverandi sameindi teirra, Sovjetsamveldið, brustu saman.

Eftir boðum frá Josef Stalin stongdi sovjetski herurin allar vegir og jarnbreytir til Vesturberlin. Stongsulin stóð við í næstan 15 mánaðir, og hesa tíðina flugu flogfør hjá vestanveldunum 278.000 ferðir til Vesturberlin. Við sær høvdu tey 2,3 milliónir tons av mati, heilivági, brennievni og ymsum øðrum neyðsynjarvørum til fólkið í Vesturberlin.



*Amerikanarin Geir Halvorsen var ein av flogskiparunum, sum flugu neyðsynjarvørur til Vesturberlin. Í gjár var hann aftur í Týsklandi (Mynd: AP)*

### STUTT SAGT

## Stillar helst uppaftur

Í Ísrael verður hildið fyri vist, at Ehud Olmert, forsætisráðharri, fer at stilla uppaftur til formansvalið í flokkinum Kadima, tá formansval verður tann 25. septembur. Tað hevur annars ljóðað, at Olmert skal hava lovað formanninum í Arbeiðaraflokkinum, Ehud Barak, at hann fer ikki at stilla uppaftur. Ísraelsku bløðini skrivaðu í gjár, at alment er eingin tílík avtala, og tí halda tey tað vera rættiliga vist, at Olmert fer at stilla uppaftur til floksformann.



*Ehud Olmert ætlar sær at halda fram sum floksformaður (Mynd: Polfoto)*

## Walesa sum njósnari

Ein bók, sum nýliga er komin út í Póllandi, vil vera við, at fyrrverandi forsetin Lech Walesa arbeiddi fyri ta loyniligu løgregluna hjá polska kommunistastýrinum í fyrru helvt av sjeytiárunum. Hann hevði dulnevnið Bolek. Teir báðir, sum hava skrivað bókina, siga, at hon byggir á upplýsingar, sum teir hava funnið í skjalagoymslum hjá tjóðsavninum, har báðir rithøvundarnir arbeiða.

Lech Walesa vísir skuldsetingini aftur. Tað ger polski forsætisráðharrin, Donald Tusk, eisini. Hann sigur, at skuldsetingin ímóti Walesa er politisk jagstran, og hann leggur landsins forseta, Lech Kaczynski, undir at vera við í jagstranini.